ARBEIÐSMEGI UTTANLANDS

Tá vit høvdu skattapolitikk sum tema í Sosialinum 4. november 2013 vísti Marita Rasmussen á avleiðingarnar av, at so nógvir føroyingar ikki rinda skatt í Føroyum. "Tað er reinur logikkur, at annaðhvørt mugu vit skerja almennu tænasturnar munandi, ella mugu tey, sum frammanundan rinda skatt her, gjalda uppaftur meira", sló hon fast tá, og hon hevur ikki broytt meining, eftir at hava sæð nýggju kanningina hjá Magna Laksáfoss

SKATTAPOLITIKKUR

Marita Rasmussen: Útlendsk vinna hevur fyrimun

Stjórin í Vinnuhúsinum heldur tað vera alneyðugt við eini skattaumskipan, soleiðis at tað skattliga ikki er ein fyrimunir hjá fólki heldur at arbeiða uttanlands enn í Føroyum. Verandi skipan veitir stuðul til útlendskar arbeiðsgevarar, og samstundis missa vit førleikarnar her heima, sigur hon.

Ingolf S. Olsen

Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, er ikki í iva um, hvat við tíðini fer at henda, um onki verður gjørt við verandi skattastøðu, har nú 1500 føroyingar, sum arbeiða uttanlands, lítið og onki rinda í skatti í Føroyum.

– Tað er reinur logikkur, at annaðhvørt mugu vit skerja almennu tænasturnar munandi, ella mugu tey, sum frammanundan rinda skatt her, gjalda uppaftur meira, slær hon fast.

– Tey flestu av okkum vilja jú hava eitt vælferðarsamfelag, sum tað vit nú hava – ella kanska eitt við enn betri tænastum – og samstundis vita øll, at tað er dýrt at reka tað, tí við einum vælferðarsamfelag fylgir ein dýrur almennur sektorur. Fortreytin fyri øllum hesum er, at vit mugu arbeiða nógv og rinda lutfalsliga nógv í skatti fyri yvirhøvur at kunna fíggja vælferðarsamfelagið. Og her er tað so, at trupulleikin uppstendur, tá ein so stórur partur av arbeiðsstyrkini, sum talan er um hjá okkum, ikki rindar skatt her, sigur Marita Rasmussen.

Góðir førleikar

Eitt eru yvirskipaðu samfelagsavleiðingarnar av eini skipan, ið skeiklar skattainntøkurnar her á landi, annað er atlitið til vinnuna, hvørs søk hon sum stjóri í arbeiðsgevarasamtakinum Vinnuhúsinum er sett til at tala.

– Vit eru fult út kappingarfør við grannalondini, tá tað kemur til førleikar – tí eru føroyingar so nógv eftirspurdir aðra staðir – og vit eru í flestu førum eisini kappingarfør, tá tað kemur til minimumslønirnar á arbeiðsmarknaðinum. Men alt hetta verður kollrent av

forðar okkara egna løggáva okkum at taka útlendska arbeiðsmegi uttanfyri norðurlondini inn í staðin fyri.

– Í løtuni er tað serliga trotið á hondverkarum, ið er trupulleikin. Ein stórur partur av teimum arbeiðir uttanlands, og avleiðingin er, at vit mangla hesar førleikarnar, tá teir skulu brúkast til verkætlanir er heima. Við tíðini er sjálvsagt vandi fyri, at hesir førleikar

at hava tað trupult við at kappast við norsku lønirnar, men fyrsta fortreytin fyri yvirhøvur at royna at kappast er, at okkara skattaskipan er kappingarfør.

Lágur norskur skattur

Tað er serliga Noreg, ið elvir til høvuðbrýggj hjá føroysku hondverkaravinnuni, tí tað er haðar, hondverkarar í hópatali leita sær.

– Tað er eisini væl skiljandi,

har – og tað eru heldur ongi argument fyri, at føroyska lønin neyðturviliga skal vera eins høg og í Noregi – men tann munurin er als ikki so stórur, sum nógv halda. At føroyingar, sum arbeiða í Noregi, tjena so nógv, sum teir gera, er fyrst og fremst tí teir arbeiða so øgiliga nógvar tímar, meðan teir eru har yviri, og tí væl meira er eftir, tá skatturin er goldin, sigur stjórin í Vinnuhúsinum.

oddarnar at arbeiða.

– Tað er vælsignað, at vit eiga so gott fólk, at tey kunna fáa arbeiði, hvar tað skal vera. Tað er bara gott fyri allar partar, at vit hava eina mobila arbeiðsstyrki, og tí mugu vit eisini hava skattaavtalur við hini londini. Men vit mugu ansa eftir, at tá so nógv fólk fara uttanlands at arbeiða, at okkara egna samfelag er kappingarført um arbeiðsmegina. Eisini

uttanlands at arbeiða heldur enn her. Eisini er ferðingin millum Føroyar og arbeiðsplássið gjørd skattafrí við eini broyting í skattalógini í fjør, og skundar hetta sjálvsagt eisini undir útferðarhugin, staðfestir stjórin í Vinnuhúsinum.

Bara ein nýskipan kann venda gongdini, heldur hon.

– Vit mugu fáa eina kappingarføra skattastøðu, og so mugu vit lata dyrnar upp

Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum: - At so nógvir føroyingar ikki rinda skatt her hevur aðrar keðiligar avleiðingar enn tær, ið eru sjónligar í krónum og oyrum. Vit hava fingið eitt samfelag, har okkara íkøst til samfelagið eru ymisk og eisini koma okkum ymiskt til góða. Ein slík støða elvir til øvund, og tað er jú syrgiligt, sigur hon

og evnini at kappast um arbeiðsmegina vegna skattliga fyrimunin, sum fólk fáa av at arbeiða uttanlands.

Skatturin má niður

Tískil er Marita Rasmussen eisini grundleggjandi ósamd við Magna Laksáfoss, sum í Vikuskiftissosialinum bagatelliseraði stóra mangulin á somu faklærdu arbeiðsmegi á landi her heima, sum fer uttanlands at arbeiða – tey flestu til Noregs.

– Hatta er ein stórur trupulleiki, sama hvussu nógv hesi fólkini so rinda í landskassan í mvg og øðrum gjøldum. Tey fara uttanlands at arbeiða, tí tey verða nógv lagaligari skattað har. Tað er har, tann veruligi trupulleikin liggur. Tí mugu skattligu viðurskiftini hjá føroyingum, sum arbeiða í Føroyum, verða javnsett við skattligu viðurskiftini hjá føroyingum, sum arbeiða uttanlands. Verður tað gjørt, átti tað ikki at verið ein trupulleiki hjá føroysku vinnuni at kappast um arbeiðsmegina. Hetta er ein stórur trupulleiki, sum má loysast skjótt, sigur Marita Rasmussen.

Hon leggur dent á, at hon ikki er úti eftir, at politikkararnir skulu løggeva føroysku arbeiðsmegina heimaftur, ella seta forðingar fyri, at hon nakrantíð fer út um landoddarnar at leita sær arbeiði.

– Vit hava eina sera dugnaliga, fleksibla og mobila arbeiðsmegi, sum er eftirspurd allastaðir. Tað er bara at frøast um. Í niðurgangstíðum her heima, er tað eisini sera heppið, at partur av arbeiðsmegini hevur lætt við at fara av landinum eftir arbeiði. Men vit skulu hava kappingarførar skipanir her heima, í hesum høpinum skattaskipanina, so vit ikki reka tey av landinum at arbeiða, sum annars helst høvdu viljað sloppið undan at skula heimanífrá í longri tíðarskeið, sigur hon og undirstrikar, at Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki øvundar teimum, sum arbeiða uttanlands og hava minni skatt enn vit, sum arbeiða í Føroyum.

– Men kjakið endar ofta í, at talan er um øvundsjúku frá okkum, sum gjalda skatt í Føroyum, men tað er tað altso ikki talan um frá okkara síðu, sigur Marita Rasmussen.

Brúkaragjøld

Ein javnseting av skattinum merkir, at føroyski lønarskatturin skal niður, og spurningurin er tá, hvussu tað skal fíggjast. Sambært kanningini so vilja øktar inntøkur frá mvg og øðrum avgjøldum fíggja hetta. Marita Rasmussun vísir tó á, at Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur mælt til at kanna møguleikarnar fyri at seta brúkaragjøld á ávísar almennar tænastur.

– Tað hevði minkað um tørvin á skattafígging og eisini minka trýstið á almennu tænasturnar, tí fólk høvdu hildið seg meira aftur, um tey sjálvi skuldu goldið ein part. Í øllum førum mugu vit gera okkara skattaskipan kappingarføra, um okkara vinnulív og føroyska samfelagið sum heild skal megna at kappast um arbeiðsmegina, sigur hon.

Magni Laksáfoss staðfestir í sínari kanning, at arbeiði er ikki í Føroyum til alla arbeiðsmegina uttanlands, og í Vikuskiftissosialinum segði hann, at tað hevði verið "beinleiðis tápuligt at reagera við ógvusligum politiskum inntrivum í møguleikarnar at fara uttanlands at arbeiða, bara tí vit fáa eyga á onkran lítlan strukturellan trupulleika, til dømis at tað eina tíð er trot á elektrikarum her heima"

– Hann hevur kanska rætt í, at vit ikki skulu yvirreagera, men trupulleikin við manglandi handverkarum í Føroyum er altso ikki ein lítil strukturellur trupulleiki, men ein sera stórur truppulleiki, sigur Marita Rasmussen.

Javnseting

Men talan er ikki um alt ella onki, heldur stjórin í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

– Føroyingar fara altíð at arbeiða uttanlands, og ein javnseting av skattaskipanunum hevði ikki fingið nakran føroying at sagt upp uttanlands fyri síðani at blivi arbeiðsleysur í Føroyum. Men ein javnseting hevði kanska fingið tey at verið her, sum helst vilja tað, og sum høvdu havt lætt við at fingið arbeiði.

– Skuldu tað hent, at føroyska vinnan eftir eina javnseting av skattinum kortini ikki megnaði at halda upp á arbeiðsmegina, ja so var tað tað, men so hevði hon tapt í einari rættvísari kapping, sigur hon.

Lítið vunnið

Stjórin í Vinnuhúsinum sigur, at serliga innan elektrikarafakið er tað ein stórur smeitur, at so nógvir elektrikarar eru farnir til Noregs at arbeiða. Og her hjálpir tað ikki serliga nógv, at ein skipan nú er, har tað ber til at taka útlendska arbeiðsmegi hendavegin, um arbeiðsloysið í byggivinnuni er niðanfyri seks prosent.

– Tað er vanliga eysturevropisk arbeiðsmegi, sum er tøk, og sum kann koma hendavegin. Men har eru tey von við heilt aðrar standardir og loysnir enn tær, sum eru vanligar í Vesturevropa. Tí kenna elektrikarar eystaneftir sum oftast ikki komponentarnar, vit brúka, og tískil kunnu hesir ikki traðka inn í eitt starv her uttan fyrst at fara undir eina sera drúgva upplæring, og tá er lítið vunnið, sigur Marita Rasmussen.

Fakta:

Seinasta týsdag legði Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, fram eina kanning, sum hann hevði gjørt fyri Áhugafelagið Antares og Føroya Skipara- og Navigatørfelag, um árinini á føroyska búskapin av føroyskum arbeiðsmegini uttanlands.

Sosialurin hevði greinar um kanningina í tema í Vikusskiftissosialinum.

Sambært kanningini leggur ein føroyskur løntakari uttanlands í meðal líka nógvan pening í almennu kassarnar í Føroyum sum ein løntakari í Føroyum, tó at løntakararnir uttanlands samanlagt rinda ógvuliga lítið í skatti í Føroyum.

Niðurstøðan hjá Magna Laksáfoss var, at føroyska arbeiðsmegin uttanlands ikki er nøkur byrða fyri samfelagið, men ein vinningur fyri bæði samfelagið sum heild og fyri almennu kassarnar. Hann helt tí, at tað hevði verið beinleiðis skeivt at roynt at fingið hesar føroyingarnar heimaftur at arbeiða.

Kanningin byggir í høvuðsheitum á tøl frá Taks, og tey eru frá 2012. Tá arbeiddu umleið 2500 føroyingar uttanlands, svarandi til útvið 10 prosent av allari tí føroysku arbeiðsmegini. Íroknaðir eru teir umleið 800 føroyingarnar, sum í 2012 virkaðu undir FAS-skipanini.



Ferðandi arbeiðsmegi

Magni Laksáfoss

ARBEIÐI UTTANLANDS ER GOTT FYRI BÚSKAPIN

Vit skulu í stundini gevast at brúka orku upp á negativa fokusering upp á teir 2500 føroyingarnar, sum arbeiða og rinda skatt uttanlands, og heldur brúka orku upp á at menna og effektivisera verandi vinnur her heima og almennu umsitingina. Tað sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, sum í nýggjari kanning staðfestir, at føroysk arbeiðsmegi uttanlands gevur eins stórt íkast í heimliga búskapin og arbeiðsmegin, sum arbeiðir í Føroyum

Næstan allir fiskimenn við útlendskum skipum rinda skatt í Føroyum

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Seinastu árini hevur nógv verið tosað um nógvu føroyingarnar, sum, hóast teir og teirra familjur verða búgvandi í Føroyum, leita sær uttanlands eftir arbeiði og rinda meginpartin av skattinum har.

Og oftast hevur útgangsstøðið fyri kjakinum verið, at tað er ein samfelagsligur trupulleiki, at so nógvir føroyingar – 10 prosent av samlaðu arbeiðsmegini – arbeiða uttanlands, tí trot er á faklærdari arbeiðsmegi her heima, og serliga

»Tápuligt at reagera við ógvusligum politiskum inntrivum í møguleikarnar at fara uttanlands at arbeiða«

smærri kommunur við lutfalsliga nógvum íbúgvum, sum starvast uttanlands, hava merkt sviðan av vantandi kommunuskattinum frá hesum borgarum.

Men sambært kanningini, sum Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, hevur gjørt fyri Áhugafelagið Antares og Føroya Skipara- og Navigatørfelag, eigur myndin at vendast á høvdið. Íkastið í føroyska samfelagsbúskapin frá hesari okkara ferðandi arbeiðsmegi er nevniliga eins stórt í krónum og oyrum per persón og íkastið frá teimum, ið arbeiða í Føroyum. Við øðrum orðum er samlaða almenna inntøkan frá einum persóni, ið hevur sína inntøku í einum øðrum landi, í miðal á sama stigi sum tilsvarandi almenna inntøkan frá einum føroyingi, sum arbeiðir og rindar sín skatt í Føroyum.

Rinda avgjøld

– Tey, sum arbeiðia uttanlands, hava gjøgnumgangandi eina væl hægri nettoløn enn tey, ið arbeiða í Føroyum. Tað merkir so, at keypiorkan og harvið nýtslan er størri, og tí kemur í miðal væl meira inn í mvg og øðrum avgjøldum frá einum føroyingi, ið arbeiðir uttanlands, enn frá

6 SÍÐUR TEMA Í temasíðunum í Sosialinum hesaferð kanst tú lesa um positivu árinini, sum føroysk arbeiðsmegi uttanlands sambært einari nýggjari kanning hevur á føroyska búskapin.

Tað er gott fyri føroyska búskapin, at so nógvir føroyingar sum nú arbeiða uttanlands, og tað hevði elvt til arbeiðsloysi, minkandi og kanska negativan vøkstur, um hesir vórðu tvungnir heimaftur, staðfesti Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, millum annað, tá hann týsmorgunin legði fram kanningina um árinini á føroyska búskapin frá føroysku arbeiðsmegini uttanlands. – Tí hevði tað eisini verið beinleiðis tápuligt at reagera við ógvusligum politiskum inntrivum í møguleikarnar at fara uttanlands at arbeiða, bara tí vit fáa eyga á onkran lítlan strukturellan trupulleika, til dømis at tað eina tíð er trot á elektrikarum her heima, sigur hann.

MYNDIR: ÁLVUR HARALDSEN

einum, ið arbeiðir í Føroyum. Tað er henda størri nýtslan og ringvirkningarnir av henni, ið gera, at roknistykkið við almennu inntøkunum er líka pent fyri tey, ið arbeiða uttanlands, sum fyri tey, ið arbeiða her heima, greiðir Magni Laksáfoss frá.

Við støði í kanning síni er hann komin til ta niðurstøðu, at føroyska arbeiðsmegin uttanlands ikki er nøkur byrða fyri samfelagið, tvørturímóti, og at vit tí ikki eiga at brúka orku uppá at royna at fáa hesi fólkini heim til Føroya at arbeiða.

– Eg veit væl, at vit hava onkran fløskuháls, tá tað snýr seg um faklærda arbeiðsmegi, serliga er trot á elektrikarum her heima. Men vit tosa her um eitt sera avmarkað trot, og samanumtikið er lætt at staðfesta, at vit ikki hava størv til nógv tann størsta partin av teimum 2500 føroyingunum, sum arbeiða uttanlands í dag, sigur Magni Laksáfoss.

Íkast ella byrða

Hann ávarar tí staðiliga ímóti, at skattligar ella aðrar forðingar verða settar í verk politiskt, soleiðis at tað ikki fer at loysa seg eins væl og nú at fara uttanlands at arbeiða.

– Tað hevði havt við sær, at íkastið í samfelagsbúskapin frá føroysku arbeiðsmegini uttanlands knappliga hevði farið frá at vera fult á hædd við tað frá tí heimligu arbeiðsmegini til at vera negativt – teir høvdu blivið ein byrða fyri samfelagið. Tí teir høvdu í stóran mun komið heim til arbeiðsloysi – ella teir høvdu trokað onnur út í arbeiðsloysi. Tað hevði elvt til minkandi og kanska negativan vøkstur, sum síðani aftur allarhelst hevði elvt til fólkafráflyting. Tí hevði tað eisini verið beinleiðis tápuligt at reagera við ógvusligum politiskum inntrivum í møguleikarnar at fara uttanlands at arbeiða, bara tí vit fáa eyga á onkran lítlan strukturellan trupulleika, til dømis at tað eina tíð er trot á elektrikarum her heima, sigur Magni Laksáfoss.

Hann heldur, at bæði politikarar og vinnan fokusera alt ov nógv á negativ árin av, at føroyingar leita sær uttanlands at arbeiða.

– Trýstið á føroysku lønirnar veksur, tá tað er so lætt at fara til dømis til Noregs at arbeiða, og tí verður føroyska lønarlagið drigið uppeftir, er ein atfinning móti verandi skipanum, sum eg ofta hoyri. Men hvat so, um føroyskir løntakarar vilja verða løntir ájavnt við starvsbrøðurnar í grannalondunum? Um vit ætla at menna hetta landið og vinnurnar her heima, so er tað neyvan serliga klókt at hava sum mál, at vit skulu hava lægri lønir enn í grannalondunum, sigur hann.

Fokus á menning

Heldur enn at hava negativit fokus á føroysku arbeiðsmegina uttanlands, eiga politikarar og vinna at miðsavna seg um at menna og effektivisera verandi vinnur her heima, heldur Magni Laksáfoss.

– Føroyska vinnan skal vera kappingarfør við tilsvarandi vinnur í grannalondunum, eisini í lønum, og tá verður heldur ongin trupulleiki at fáa fólk til arbeiðis í henni. Tað krevur sjálvsagt støðuga menning og effektivisering, og her má almenna umsitingin eisini fylgja við. Men fólkatalið og støddin á føroyska búskapinum ger, at tað altíð fer at vera neyðugt hjá einum parti av okkara arbeiðsmegi at arbeiða uttanlands – og tølini í kanningi vísa jú, at tað bara er gott fyri búskapin.

– Hvussu stórt hetta talið eigur at vera, er ilt at siga, men nógv bendir á, at tað eins og føroyski útflutningurin regulerar seg sjálvt og finnur eina náttúrliga legu. Føroyski útflutningurin liggur javnt á umleið 40 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni. Í løtuni arbeiðir umleið 10 prosent av arbeiðsmegini uttanlands, og kanska er tað eisini tann náttúrliga legan fyri tað talið, sigur Magni Laksáfoss..

Tað má býtast rætt

Tá alment kjak var um skattanýskipan í 2011, argaðust nógvir politikarar á støðuna, har føroyska arbeiðsmegin uttanlands lítlan og ongan skatt rindaði her heima. Serliga vóru tað kommunukassarnir í kommunum við lutfalsliga nógvum útisiglarum, ið bløddu.

– Men eisini her var púra skeivt fokus. Tí Granskingardepilin, sum eg eisini var partur av tá, gjørdi longu í 2008/2009 eina kanning fyri Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag um búskparárinini av føroyskum sjófólki í starvi uttanlands. Hon vísti eins og henda nýggja, at árinini bara vóru positiv. Tí vóru tað og eru tað politikararnir sjálvir, ið við einum røttum fordeilingspolitikki skulu syrgja fyri, at almennu inntøkurnar frá føroysku arbeiðsmegini uttanlands verða kanaliseraðar út har, sum tær náttúrliga eiga at enda, millum annað hjá kommununum. Hetta, skilji eg, verður eisini gjørt nú, eftir at eldraøkið er lagt út til kommunurnar at umsita, sigur Magni Laksáfoss.

INGOLF@SOSIALURIN.FO

Talvan vísir, at arbeiðsmegin uttanlands ikki stendur aftanfyri arbeiðsmegina her heima, tá tað snýr seg um at leggja eftir seg í almennu kassarnar. Í so máta er arbeiðsmegin uttanlands næstan á hædd við alivinnuna og eitt fitt petti omanfyri flakavinnuna

KELDA: MAGNI LAKSÁFOSS, »FØROYSK ARBEIÐSMEGI UTTANLANDS – EIN FONGUR FYRI SAMFELAGIÐ«